# Vermandi keldur í **Valletta**



**27 ÁRA** GAMLI KAMBSDALSBÚGVIN **HENRY MARGEIR PETERSEN** FANN KÆRLEIKAN Í TVEIMUM DJÚPUM, BRÚNUM **MALTESISKUM** EYGUM, EITT LÝTT KVØLD Í **VALLETTA** FYRI ÁRI SÍÐANI. Í DAG LIVA TEY **DREYMIN** Í EINUM MALTESISKUM **SAMFELAG**, HAR FERÐIN ØKIST Í TRÁÐ VIÐ **FRÁFERÐIRNAR** HJÁ **LÁGPRÍSFLOGFELØGUNUM**, SAMSTUNDIS SUM **SØGAN** OG **MENTANIN** FÁA TANN **VITJANDI** AT STEÐGA Á OG BARA **NJÓTA** LØTUNA



**MALTA**
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@kallnet.fo

Wagga Wagga yeah yeah, this time for Afrika. Summarhittið úr Suðurafrika rungar so hart í yvirfylta bussinum, at tað bæði doyvir larmandi motorin og kvalir dieselroykin, ið snýkir seg upp millum sveittandi mannamongdina. Vit eru áveg úr Qaura suður móti høvuðsstaðnum Valletta. Fólk smílast, og sjálvt tey hepnu, ið hava fingið eitt setur at sita á, røra seg í takt við tónarnar.

Errin greiðir førarin mær frá, at hansara bussur er bygdur einaferð síðst í fjørutiárunum. Komfortin er einki at reypa av, eingir hentleikar eru at finna í sparsomu innrættingini, og bussurin stríðist veruliga í mótbrekku.

Okay, onkursvegna skilji eg sjónarmiðið um, at tað kann vera eitt sindur troyttandi at hava hesar gomlu, gulu bussar sum álit í einum hektiskum gerandisdegi í einum modernaðum samfelag. Men píkasjey sum tað er sjarmerandi at seta seg inn í eitt ellisakfar og lata seg imponera av, at slík enn finnast. Tí vinnur nostalgiin á fornuftini, og eg taki ikki serliga væl ímóti tíðindunum um, at eitt týskt flutningsfelag við nýggjum bussum ætlar sær at yvirtaka maltesisku bygdaleiðirnar.

Hetta er onkursvegna ein mynd av tí tvístøðu, sum merkir Malta. Eitt samfelag, ið bæði vil varðveita og hjúkla um sína serstøku søgu og mentan, men samstundis stendur á speedaranum á veg inn í altjóðagerðina.

## Cafe latte

Við borðini á fortovskaféini í Republic Street, vakra og hugnaliga høvuðsgøtan í elsta býarpartinum í Valletta, verður bílagt á maltesiskum, enskum og italskum. Og í dag verður eisini heilsað á føroyskum. Maltesiskt og enskt eru mál, ið eru rótfest niður í yngstu flokkarnar í fólkaskúlunum og sum allir maltabúgvar tosa, meðan ávirkanin frá nærmastu grannatjóð ger italskt til natúrligt tungumál í hesum lítla oyggjasamfelag, har útvið 400.000 fólk búleikast á einum øki til støddar við Eysturoynna.

Henry Margeir Petersen, ið hevur lisið marknaðarføring & búskap á Niels Brock í Keypmannahavn, tók í fjørsummar eitt sokallað erasmus semester í maltesiska høvuðsstaðnum. Tað var tá, at hann hitti Joannu Delia, ella Jo, sum hon vanliga rópar seg.

- Eg var farin í eina veitslu saman við einum vinmanni, eitt kvøldið í oktober. Og har stóð hon, byrjar hann at greiða frá, og við eitt blívur frágreiðingin til ein argandi dialog millum tey bæði, soleiðis sum bara forelskað pør kunnu arga hvønnannan.

Tað var kærleiki við fyrsta eygnabrá, og í dag búgva tey saman í hjartanum av Valletta, við útsýni yvir heimskenda havnalagið.

Henry var liðugur við útbúgvingina í summar, og við próvnum frá Niels Brock í hondini fekk hann arbeiði hjá fyritøkuni Neogames, ið fæst við spøl og casinovirksemi á internetinum. Úr skrivstovunum í Valletta bjóðar fyritøkan seg fram kring alt Evropa, og uppgávan hjá Henry er at røkja danska marknaðin. Joanna er útbúgvin lækni, hon arbeiddi á einum sjúkrahúsi í trý ár, áðrenn hon í 2007 fór at arbeiða við dermatologi. Í vár lat hon upp egna klinikk í grannabýnum hjá Valletta, Sliema. Joanna er einans 29 ára gomul, men skúla- og útbúgvingarskipanin á Malta er soleiðis samansett, at til ber at nema sær hægri útbúgving á rættuliga ungum aldri, samanborið við norðurlenska leistin.

## Føtur undir gamalt borð

Tað er týðuligt, at Joanna elskar og er errin av sínum landi. Hon kennir hvønn krók, fylgir væl við í politikki og samfelagsviðurskiftum annnars, og hevur stóran áhuga í turbulentu søguni hjá Malta.

- Kanska er tað tí, at vit bæði eru oyggjabúgvar, at vit passa so væl saman, sigur hon brosandi móti sínum føroyska sjeiki.

Tað er nakað serligt við fólki úr smáum samfeløgum. Onkursvegna tykist sum kenna tey meira til sítt land, engagera seg meira í tí og hava sterkari meiningar, samanborið við fólk úr størri samfeløgum. Ein stuttlig søga av Malta sigur, at politisku diskusjónirnar gingu so heitar, at myndugleikarnir í 1992 settu forboð fyri at diskutera politikk á vertshúsum. Tosar tú politikk á Malta, so slepst ikki uttan um gamla sosialistaleiðaran Dom Mintoff, sum í eftirkrígstíðini stóð á odda fyri Sosialistaflokkin í samfull 35 ár. Í 16 ár var hann landsins leiðari, bæði undir bretska yvirvaldinum og eftir endaligu loysingina í 1974. Tað var Mintoff, sum eftir eina ósemju við bretar gjørdist so firtin, at hann strikaði hópin av bretskum gøtunøvnum og setti maltesisk nøvn í staðin. Tað var hann, sum í sjeytiárunum gav eini kinesiskari sjokulátufabrikk einkarætt at framleiða og selja sjokulátu á Malta, fyri síðani at vera møttur av vreiði, tí fólkinum ikki dámdi hetta slagið av sjokulátu. Og tað var eisini Mintoff, sum fá ár eftir